Vikuskiftið Sosialurin



## Støð 2 fleiri hyggjarar

Í Íslandi kappast tað almenna sjónvarpið hjá Ríkisútvarpinum og Støð 2 um áhugan hjá hyggjarunum, og fyri fyrstu ferð kann leiðslan á Støð 2 fegnast um, at teirra sjónvarp hevur fleiri hyggjarar í aldrinum 12-49 ár enn tað almenna RÚV. Ein kanning vísir, at tey, sum eru millum 12 og 49 ár, hyggja meiric eftir sendingum hjá Støð 2, meðan tað eldra ættarliðið heldur meiri av tí, sum RÚV hevur á skránni. Men munurin er kortini lítil.



*Pálmi Guðmundsson er stjóri á Støð 2*

*Mynd: Vísir*

## Norðoyastevna fyri durum

Vikuskiftið 6. til 8. juni verður fyrsta summarstevnan hildin í Klaksvík. Tey eru longu farin at fyrireika stevnuna, men vilja haraftrat hava fleiri fólk virkin í hesum arbeiðinum. Nevndin í Norðoyar Frítíðar- og Ítróttarráð ynskir tí at koma í samband við hesi, soleiðis at norðoyingar og gestirnir kunnu fáa eins so fjølbroytta stevnu sum tilber. Hetta skal ikki minst síggjast í ljósinum av, at Klaksvíkar kommuna í ár hevur 100 ára á baki. Formaðurin í NFÍ er Jákup Anthoniussen.

# Skálafjørður fyrst og síðani Sandoy

**Vinnumálaráðið hevur gjørt upprit um tunlarnar, sum fer at verða viðgjørt í landsstýrinum og samgonguni í næstu viku**

UNDIRSJÓVAR-TUNLAR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



Verður tað, sum Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, og Vinnumálaráðið vilja, so verður næsta ár farið undir at bora millum Skálafjørðin og Suðurstreym, og so er ætlanin í 2012 at fara undir at bora undir Skopunarfjørð.

Vinnumálaráðið hevur seinastu tíðina arbeitt við spurninginum um almennar íløgur og harvið eisini undirsjóvartunlar. Løgmaður segði í Degi í viku í gjárkvøldið, at ætlanin er, at uppritið, sum Vinnumálaráðið hevur gjørt skal leggjast fyri landsstýrið týsdagin í næstu viku. Ætlanin er eisini, at málið skal fáa víðari politiska viðgerð í næstu viku. Tað vil siga, at tað skal viðgerast í lítlu samgongu og síðani í samgonguni síðst í næstu viku.

Frá álítandi keldum veit Sosialurin, at niðurstøðan hjá Vinnumálaráðnum og Bjørt Samuelsen er, at bæði Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin skulu leggjast í alment partafelag. Ætlanin er, at Skálafjarðartunnilin skal gerast fyrst, og at tað síðani verður farið undir Sandoyartunnilin. Uppskotið til tíðarætlan er, at tað í 2009 verður farið undir at bora millum Skálafjørðin og Suðurstreym, og at tað í 2012 verður farið undir at bora undir Skopunarfirði.

Tað hevur ikki eydnast at fáa at vita, hvørjar grundgevingarnar eru undir tilráðingini hjá Vinnumálaráðnum. Men tað er áður sagt fleiri ferðir, at um Skálafjarðartunnilin verður gjørdur fyrst, so fer almenna partafelagið at fáa stórar inntøkur beinanvegin.

Tað verður ikki roknað við, at Sandoyartunnilin fer at geva nógv størri inntøkur, enn sjálvur raksturin fer at kosta. Tað vil siga, at har verður millum lítið og einki til rentur og avdráttir.

Eingin ivi er um, at talan verður um ógvuliga turbolenta politiska viðgerð í næstu viku. Undan viðgerðini er greitt, at partar av samgonguni ikki taka undir við uppritinum hjá Vinnumálaráðnum. Gerhard Lognberg úr Javnaðarflokkinum og Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldisflokkinum hava higartil aftur og aftur hildið rimmar fast um samtyktina, sum løgtingið gjørdi undan valinum. Tann samtyktin sigur, at tað skal farast undir Sandoyartunnilin 1. november í 2009.

Miðflokkurin boðaði fyri stuttum frá, at hann er ikki fyri, at Skálafjarðartunnilin verður lagdur í alment partafelag. Miðflokkurin vil, at Skálafjarðartunnilin verður gjørdur av privata partafelagnum, sum hevur arbeitt við verkætlanini, og sum kommunurnar kring Skálafjørðin eiga í.

# Góður máti at sleppa av við Gerhard

**Sandoyartingmaðurin fer undir ongum umstøðum at góðtaka eina ætlan hjá Bjørt Samuelsen um at útseta Sandoyartunnilin til 2012**

ALMENNAR ÍLØGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vil samgongan sleppa av við meg, er tað bara at útseta Sandoyartunnilin.

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður úr Sandoy, staðfestir enn einaferð, at hann fer undir ongum umstøðum at góðtaka, at Sandoyartunnilin verður útsettur.

Sostatt fer hann heldur ikki undir nøkrum umstøðum at góðtaka eina avgerð í samgonguni um at útseta tunnilin til í 2012.

Landsstýriskvinnan í vinnumálum hevur gjørt eitt tilmælið til samgonguna um, hvussu undirsjóvartunnilin í Eysturoy og Sandoy, skulu raðfestast.

Sum sæst í greinini omanfyri, hava vit fingið upplýst, at hon fer at mæla samgonguni til, at báðir tunlarnir verða lagdir undir tað almenna og at farið verður undir Eysturoyartunnilin næsta ár og at Sandoyartunnilin skal bíða til í 2012.

- Hetta er besti mátin hjá samgonguni at sleppa av við Gerhard Lognberg, sigur Sandoyartingmaðurin.

Hann ger enn einaferð púra greitt, at hann fer ikki undir nøkrum umstøðum at góðtaka, at Sandoyartunnilin verður útsettur.

Vit spurdu hann eisini um tað ikki er ein trupulleiki fyri samgonguna, at hann tekur eina so greiða støðu til tunlarnar frammanundan og at hann ikki vil atkvøða fyri øðrum málum, fyrrenn avgerð er tikin um tunnilin.

- Tað er avgjørt ein trupulleiki fyri samgonguna, men tað er ein størri trupulleiki fyri meg, at eg onki fái at vita. Tí er bara eitt at gera og tað er at fáa eina avgerð sum skjótast, so vit vita um tað verður egg ella ungi og um eg verið innanfyri ella uttanfyri, sigur Gerhard Lognberg.

### Tigandi politikarar

Aðrir tinglimir, eru ikki so avgjørdir.

Hin Sandoyartingmaðurin, Páll á Reynatúgvu, hevur hoyrt okkurt graml um tilmælið hjá Bjørt Samuelsen, men hann hevur heilt avgjørt onga viðmerking, fyrrenn samgongan hevur viðgjørt málið.

Bill Justinussen í Miðflokkinum hevur heldur onga viðmerking.

Miðflokkurin hevur annars gjørt greitt, at hann vil hava, at privata partafelagið varðveitir Eysturoyartunnilin og at tað almenna ger Sandoyartunnilin.

- Tað er ikki okkara upplegg, men vit hava ikki læst okkum fast og eru til at tosa við um eina loysn. Tað týdningarmesta fyri okkum, er at tunlarnir verða gjørdir, so hevur tað minni týdning, hvør ger teir, sigur Bill Justinussen.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum hevur heldur onga viðmerking.

Men hon fer at hava fleiri uppskot við sær at leggja fyri samgonguna og sjálvt um hon sjálv hevur eitt ávíst tilmæli, vil hon ikki siga, hvat tað er.

- Men tit skulu vera varin við at lurta eftir leysasøgum, leggur hon afturat.



*- Vil samgongan sleppa av við meg, er besti mátin at útseta Sandoyartunnilin til 2012, sigur Gerhard Lognberg*